# TEY FARA AT KE

FYRI SKJÓTT EINUM ÁRI SÍÐANI FLUTTI **JÓAN SÍMUN EDMUNDSSON** FRÁ TRYGGU UMSTØÐUNUM Á **TOFTUM** TIL EIN ÓKENDAN HEIM Í **NEWCASTLE** Í NORÐUR-ONGLANDI. SÍÐANI ER JÓAN SÍMUN BLIVIN FASTUR MAÐUR Á **LANDSLIÐNUM** OG Á **EYKALIÐNUM** HJÁ NEWCASTLE. **VIÐHALDSFÓLKINI** KENNA IKKI LJÓSA **HÁRIÐ** Á TOFTAMANNINUM ENN, MEN STENDUR TAÐ TIL **JÓAN SÍMUN** SJÁLVAN, SO VERÐUR TAÐ IKKI LEINGI AFTURAT, INNTIL HANN VERÐUR **KENDUR** AFTUR





**»** *- Í longdini er málið sjálvandi at sleppa á besta liðið.*

**SAMRØÐA**
Tróndur Arge

Tað er 11. desembur, og norðari partur av Bretlandi er klæddur við tjúkkum kava aðru vikuna á rað. Í Newcastle er tað nógva av kavanum ruddað burtur, og kuldin tykist ikki fara at órógva dystin millum Newcastle og Liverpool, ið er á skránni hetta leygarkvøldið.

### Til dyst við Jóan Símuni

Jóan Símun hevur bjóðað Sosialinum við á St. James' Park, ið er heimavøllurin hjá besta liðnum hjá Jóani Símun og teimum í Newcastle. Sosialurin hittir Jóan Símun uttanfyri St. James' Park, ið liggur mitt í Newcastle býi. Jóan Símun er ílatin einar ljósar kovboybuksur, eina gráa hettutroyggju, og so hevur hann eina ljósabláa húgvu smoygda niður um bæði oyruni. Hann er bara 19-ára gamal og livir fótbóltsdreymin í einum av teimum størstu fótbóltsfeløgunum í Onglandi.

Tað eru tveir tímar til dysturin skal bríkslast í gongd, men fleiri viðhaldsfólk eru longu møtt upp at vísa sína ónøgd við Newcastle eigaran, Mike Ashley. Hann er komin í andróður tí hann í vikuni koyrdi vældámda venjaran, Chris Hughton, frá. Sjálvt um vit ganga mitt gjøgnum eina mannamúgvu av fanatiskum Newcatle viðhaldsfólkum, so er tað ongin, ið kennist við Jóan Símun.

- Nei, tey kenna meg ikki aftur, men vónandi gera tey tað í framíðini, sigur Jóan Símun við einum smíli og tað skilst týðuliga, at hann vil hava tey at kenna hann aftur fyri síni avrik á vøllinum.

### Skift venjara

Viðhaldsfólkini halda fram við at rópa slagorð eftir Mike Ashley. Oddvitin í mótmælinum er ein stuttur skallutur maður í Newcastle toyggju. Á rygginum stendur; "Up where we belong"(Upp har sum vit hoyra heima) vísandi til, at Newcastle aftur er í bestu deildini hetta kappingarárið.

**»** *Eg havi faktist gjørt framstig á øll økjum, men tú mennist eisini, tá tú kemur at venja við betri leikarum.*

- Hasin plagar at verða til onkrar av okkara venjingum, sigur Jóan Símun, meðan leiðin gongur gongur inn har fjølmiðlarnir halda til. Har skal myndamaðurin hjá Newcastle taka nakrar myndir av Jóan Símuni.

Spælararnir hjá Newcastle royna at tosa sum minst um fráfarna venjaran Chris Hughton og nýggja venjarin Alan Pardew. Tað er eisini galdandi fyri til tíðir lítilatna toftamannin.

- Tað kemur sum eitt lítið sjokk, akkurát tá teir koyra Chris Hughton. Vit á eykaliðnum leggja ikki so væl til merkis, at fyrstaliðið hevur fingið ein nýggjan venjara. Vit hugsa bara um at spæla fótbólt, sigur Jóan Símun, meðan vit ganga gjøgnum

**»** *Tú venur teg skjótt við, at tað eru kendir Premier League leikarar, ið tú venur saman við.*

tunnilin, ið leiður okkum út á grasið á St. James Park.

Bæði myndamaðurin og fjølmiðlaábyrgdarin hjá Newcastle kennast við Jóan Símun og heilsa upp á hann. Myndamaðurin gevur Jóani Símun eina Newcastle troyggju, og so er klárt at taka myndir. Myndamaðurin tekur nakrar og biðjur síðani Jóan Símun fara úr húgvuni. Við eitt sindur av illvilja tekur Jóan Sìmun húgvuna av, men sigur samstundis smílandi á føroyskum, at tað er myndin við húgvuni, ið skal nýtast.

### Býr hjá vertsfamilju

Jóan Símun kom einsamallur til Newcastle sum bara 18-ára gamal, men



